# 8 spurningar um jól

## Heðin Mortensen

***Hvat er tað besta við jólunum?***
Jólini eru nakað serligt. Hetta er sum á jólum, verður ofta tikið til um okkurt, sum er sera gott. Tað besta við jólunum er hugnin saman við familjuni, at fara í kirkju at hoyra jólaboðskapin, syngja jólasálmar og at njóta friðin, sum har er.

***Hvat er tað keðiligasta við jólunum?***
Beinleiðis keðiligt vil eg ikki siga nakað er, men tað kenst eitt sindur ørkymlandi, at tað verður gjørt so nógv hóvasták burtur úr jólafyrireikingunum.

***Hvussu helt tú jól sum barn?***
Saman við foreldrunum og beiggjunum í Trongisvági. Vit tríggir hugnaðu okkum undir góðum og tryggum umstøðum. Tá bleiv ikki gjørt so nógv burtur úr stákinum undan jólum, men so mikið størri var spenningurin og gleðin, tá jólini endiliga upprunnu.

***Hvussu heldur tú jól í ár?***
Øll árini, eg havi sitið í býráðnum, havi eg verið til jólahugna á Ellisheiminum í Havn jólaaftan kl. 14. Har er altíð sera hugnaligt, og gleði eg meg til at vitja har aftur í ár. Sonurin, sum lesur niðri, kemur heim at halda jól. Jólaaftan halda vit hjá okkum saman við elstu dóttrini og familju hennara. Tað er altíð serliga stuttligt jólaaftan, tá børn eru við, tey eru so spent og glað fyri allar jólagávurnar. – Jóladøgurðin er føroysk gás av trøðni í Havnardali. Tankarnir leita tá til hinar báðar døturnar og teirra familjur, sum búgva í Álborg. – Tey eta sjálvandi eisini føroyska gás jólaaftan.

***Hvat heldur tú um jólaresið í desember?***
Tað ræður um at duga ikki at lata seg ávirka ov nógv av øllum tí, sum fyrifersti í desember, tí so verður tað alt ov strævið. Annars so gleðist eg um jólahugnan, sum er í býnum, fólk eru glað og fryntlig. Er veðrið gott, so er desembermánaður sera hugnaligur. Dagurin er stuttur, so øll jólatrøini og ljósini í býnum koma rættuliga til sín rætt.



***Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?***
Nei, ongantíð. Havi altíð hildið jól heima í Føroyum. Enn hava børnini, sum búgva niðri, ikki fingið lokkað meg niður at halda jól.

***Keypir tú sjálvur tínar jólagávur?***
Nei, Hjørdis keypir allar gávurnar, uttan ta einu, sum hon fær frá mær.

***Hvat ynskir tú tær í jólagávu?***
Mítt hægsta ynski er altíð at fáa eina friðaliga høgtíð saman við familjuni. Annars ynski eg mær føroyskar bøkur í jólagávu, og gleði meg til at seta meg niður at lesa í frið og náðum.


























